# Oyggjablaðið

## Oyggjablaðið í næstu viku: Skála

**Oyggjaredaktiónin:**





Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

## Hesaferð: Handilsøkið á Hálsi

**Í hesum blaðnum seta vit fokus á handilsøkið á Hálsi í Havn. Í blaðnum er hetta:**

**Síða 18:** Sóleyð lærir á skrivstovuni

**Síða 20-21:** Byggifelag er elst á gøtuni

**Síða 22-25:** Torkil vaks upp í økinum

**Síða 28-29:** Gunvá arbeiðir í nýggjasta handlinum

**Síða 30:** Nógv er broytt

**Síða 32:** Tey vitja ofta á Hálsi

# Í læru á skrivstovuni





*Sóleyð Staksberg (36) er skrivstovulærlingur hjá Guttesen & Staksberg á Smyrilsvegi 3 á Hálsi*

**Nær byrjaði tú at læra?**

Eg byrjaði at læra her í septembur 2009, so eg havi verið her í hálvtannað ár. Eg var útlærd sum sjúkrarøktarfrøðingur hjá Hovedstadens Sygehusfællesskab í mai mánaði 2003, og havi eg starvast sum sjúkrasystir á intensivu deild á Landssjúkrahúsinum. Men eg havi eisini arbeitt hjá G & S fyrr sum avloysari í ferium og líknandi, so arbeiðið á skrivstovuni var ikki fremmant fyri meg, tá eg byrjaði í læru. Haraftrat havi eg lokið HH-prógv.

**Hví arbeiðir tú á eini skrivstovu og ikki eini deild?**

- Eg eri einlig mamma við tveimum børnum, og tá er ringt at fáa tær skiftandi arbeiðstíðirnar á eini deild á einum sjúkrahúsi at passa saman við einum húsarhaldi. Eitt nú er eingin barnaansing um kvøldið og um vikuskiftið. Tá eitt skrivstovufólk fór í farloyvi, fekk eg arbeiði her sum skrivstovulærlingur. Her eru eisini meiri hóskandi arbeiðstíðir - eg møti klokkan 9:00 og fari til hús aftur klokkan 16:30.

**Hvat gert tú á skrivstovuni?**

- Tað er ein øgilig rúgva av føstum uppgávum hvønn einasta dag á eini skrivstovu sum hesari. Eg havi eisini við søluna av íbúðum og raðhúsum okkara í Maritugøtu í Hoyvík at gera, og taki mær av teimum ymisku fyrispurningunum frá fólki í hesum sambandi. Annars er hetta arbeiðið neyvan so nógv øðrvísi enn á øðrum skrivstovum, við avgreiðslu, bókhaldi og øðrum ið hartil hoyrir.

*snorri@sosialurin.fo*

## Norðast til sunnast við Oyggjablaðnum




**Síðani á vári í fjør hevur Sosialurin havt Oyggjablaðið sum eitt eykablað í hvørjum mikudagsblaði.**

**Her hava vit vitjað kring oyggjarnar, eins og vit hava tikið upp ávís viðkomandi evni, so sum veiðu, føroyska framleiðslu, bilar, fiskivinnu og bøkur.**

**Í Oyggjablaðnum eru vit nú í gongd við eina nýggja rundferð kring oyggjarnar, sum í stóran mun fylgir 7. breiddarstigi á heimsatlasinum.**

**Vit hava valt at kalla rundferðina "Føroyar - norðast til sunnast". Ætlanin er so líðandi, men tó ikki slaviskt - at vitja flestu bygdir og oyggjar, ið liggja nærhendis hesum ása hetta komandi árið.**

**Av og á fara vit eisini aðra leið, sum í hesum blaðnum, har økið á Hálsi í Havn verður umrøtt.**

**Góðan lesihug.**

*snorri@sosialurin.fo*